


*Fyrst í komandi ári kemur Opel Insignia, sum avloysir núverandi Opel Vectra*

# Opel Insignia í nýggjum stíli

**Fyrst í komandi ári verður núverandi Opel Vectra avloystur av einum heilt nýggjum Opel Insignia, sum í fyrstu atløgu verður gjørdur sum hatchback og sedan. Í apríl 2009 kemur Insignia Sports Tourer, sum er stationcar útgávan**

Við Insignia hava Opel heilt skift stíl í mun til forgangarin. Við at hyggja at myndunum sæst at talan er um ein supermodernaðan bil við sportligum designi og kvalitet-urin er á sera høgum støði.

Kappingin er hørð í hesum klassanum, og teir flestu av kapp-ingarneytunum eru komnir ella eru á veg við nýggjum modellum. Við hesum nýggja Insignia hava Opel sera góð kort á hondum í kappingini um kundarnar.

Insignia er ein framkomin bilur við nýggjastu motortøknini, aktiv-ari trygd og umhvørvisvernd.

Bilurin er stórur og rúmligur í allar mátar. Gott pláss til fimm ferðandi og terra viðføri. Viðføris-rúmið er 540 litrar.

Hesin nýggi Insignia er 4,83 m langur og er sostatt umleið 20 cm longri enn núverandi Vectra.

Stationcar útgávan, Insignia Sports Tourer, er ein rættuliga stórur bilur, hann er 4,91 m lang-ur, 8 cm longri enn hatchback og sedan útgávurnar.

Insignia koma við bensinmotor-um frá 1,6 litra við115 hk til 2,8 litra við 260 hk, og dieselmotorum frá 110 til 160 hk. Seinni koma eisini aðrar útgávur.

Insignia verður gjørdur í Týsk-landi á Opel verksmiðjuni í Rüsselsheim, sum er ein av mest modernaðu og framkomnu bil-verksmiðjum í heiminum.

Opel Insignia sedan og hatch-back koma á marknaðin í januar 2009 og Insignia Sports Tourer kemur í apríl.



*Insigna kemur í fyrstu atløgu sum hatchback og sedan*



*Insignia Sports Tourer kemur í apríl*



*Opel Insignia innan*

PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN
P/F Auto Service · Undir Krákugjógv 19 · FO-100 Tórshavn
Tlf. (+298) 345400 · Telefax (+298) 345401 - 345402
Auto Service
www.autoservice.fo